# 360 á Hjalla hevur nærum alt

## Hjá 360 á Hjalla er nærum alt at fáa, og lættast er at siga, at har fæst alt til húsini, uttan møblar

Á Hjalla í Havn er forvitnisligt handilsøki, har nógv vitjandi koma framvið, og tey koma eisini innar í tær ymsu fyritøkurnar, ið har eru. Ein teirra er 360 á Hjalla.

360 á Hjalla hevur nærum alt, og fá leita til fánýtis á Hjalla.

Er tað flatskermur, bilannlegg ella hvítvørur, ið einum tørvar, so fæst tað hjá 360 á Hjalla.

Og sama kann sigast um t.d. gávulutir, uttandura máling, og nú summarið er í nánd, so er tað hent, at hjá 360 fáast eisini súkklur. Tað eru nevniliga ikki so mong, ið selja súkklur longur.

Eisini hevur 360 byggimarknað og gólvklæðning.

### Tilboð

Vert er eisini at vitja á Hjalla í løtuni, tí í køksdeildini hava tey nú tilboð og ein fær 20% í avsláttri.

Fyri lættast at lýsa 360 á Hjalla, so er lættast at siga, at har fæst alt til húsini, uttan møblarnir.

### ekort

Í samband við ekort samstarvið, sum 360 er partur av, so verður sagt av Hjalla, at tey har hava selt nógv á henda hátt.

Tey meta skipanina verða góða og hava góðar royndir, og meta eisini, at kundarnir hava góðar royndir, og eru glaðir fyri skipanina.

Alt í alt hava tey alt gott at bera skipanini, og vóna tey, at ekort skipanin rættiliga tekur dik á seg, so enn fleiri fáa eyguni upp fyri fyrimununum, so tey fáa lut í teimum.




# Bixin og Mega hava klæðini til børn og ung



## Eigararnir av Bixini og Mega hildu tað vera gott hugskot, at handlarnir í SMS fóru uppí ekort samstarvið. Bixin og Mega venda sær í størstan mun til børn og ung

Bixin telist millum nýggjaru handlarnar í Havn. Handilin læt upp í miðbýnum tann 22. november í 2003, og hevur síðani ment seg til at teljast millum teir fremstu av sínum slagi í landinum.

Bixin hevur síðani 25. oktober 2006 hildið til í SMS, og er Bixin ein av fleiri nýggjum handlum, sum tá komu í sølumiðstøðina. Hølisumstøðurnar eru tær higartil bestu hjá Bixini.

Fyrst og fremst leggur Bixin seg eftir at bjóða fram eitt fjølbroytt úrval av snøggum og dygdargóðum klæðum til børn í aldrinum millum 0 og 10 ár.

Alla tíðina royna vit at útbyggja úrvali av klædnamerkjum og -vørum, ið liva upp til tey stóru krøv, vit sjálv seta okkara úrvali.

Sum dømi um klædnamerki, ið fáast í Bixini, kunnu nevnast Al-X, Bisgaard, Diesel, Hummel, Levi's, Urban Elk, Wheat.

### Mega

Mega er líkasum onnur síða av somu søk, og heldur til í somu hølum, sum Bixin. Í Mega verður tikið yvir, har Bixin sleppur. Í Mega leggja tey seg eftir at hava ungdómsklæðir.

Men í dag er tað so, at markið millum tað, ið tey ungu vilja hava, og tað, sum vaksin ganga í, ikki altíð er so lætt at síggja. Tí vendir Mega sær ikki bert til tannáringar, men eisini til vaksin.

Mega er sostatt handilin til tannáringin, men eisini til tey, ið eru komin eitt sindur longur, og hava fingið nøkur ár afturat løgd afturum seg.

### Gott hugskot

Í Bixini hildu tey tað vera gott hugskot, tá handlarnir í SMS ætlaðu sær við í ekort samstarvið, og í Bixini eru tey eisini glað fyri hetta og meta, at tað eru kundarnir somuleiðis.